Lindin:

# Alt skal fáast upp á pláss

**Lindin arbeiðir við at finna út av, um tað er sendarin hjá teimum, sum er orsøkin til útvarpstrupulleikar í Klaksvík**

ÚTVARP

*Eyðun Klakstein*

Síðani Lindin fór at senda í Klaksvík, hava lurtilíkindini ikki verið tey somu, sum klaksvíkingar eru vanir við.

Eingin dugir rættiliga at siga, hvør orsøkin er til, at nógv lurtitól verða órógvað av sendingunum hjá Lindini.

– Vit duga ikki at siga, um tað er okkara sendari, sum er orsøkin til trupulleikarnar, men vit arbeiða við málinum, og Føroya Tele skal gera mátingingar á Brúnaskarði, so vit kunnu finna møguligt mistak, sigur Preben Hansen, nevndarformaður í Lindini.



*Preben Hansen, nevndarformaður í Lindini*

### Kenna trupulleikan

Lindin, sum hevur eitt ár á baki, fór leygardagin undir at senda kristiligt útvarp til Klaksvíkar umvegis nýggjan sendara á Brúnaskarði.

Síðani hava nógv fólk vent sær til Fjarskiftiseftirlitið við klagum um, at lurtitólini eru vorðin órógvað av Lindini.

– Tá vit byrjaðu at senda í Havn var sami trupulleikin, og tá vísti tað seg, at trupulleikin var tey gomlu útvarpstólini, sum ikki klára at skilja ímillum fleiri rásir, sigur Preben Hansen.

### Neyvan fyrstu dagarnar

– Vit vita ikki, um hetta er sami trupulleikin í Klaksvík, men vit ætla at finna út av, um tað er okkara sendari, sum er orsøkin til trupulleikarnir, sigur Preben Hansen.

Lindin hevur dagliga samband við Fjarskiftiseftirlitið og Føroya Tele, men enn eru neyðugu mátingarnar ikki gjørdar á Brúnaskarði.

Fólk frá Føroya Tele ætla sær ikki niðan á Brúnaskarð, fyrr enn veðrið er vorðið betri. Tí verður trupulleikin neyvan staðfestur komandi dagarnar.

# Skjótt og bíliga til Aberdeen



TÍÐINDASKRIV

Atlantic Airways hevur gjørt av at taka flúgvingina til Aberdeen uppaftur frá mánadegnum 19. februar. Í tí sambandinum bjóðar Atlantic Airways ferð og uppihald í Aberdeen í fýra dagar fyri einans 1.526 krónur. Ferðaavgjaldið, sum skal leggjast afturat er 474 krónur fyri hvønn.

– Upprunaliga var ætlanin at taka flúgvingina uppaftur seinast í mars, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways. Men bæði oljuvinnan í Aberdeen og vinnulívsfólk í Føroyum hava víst stóran áhuga fyri, at fáa beinleiðis flúgvingina millum Føroyar og Aberdeen í gongd aftur sum skjótast, tí tað lættir munandi um samskiftið og samstarvið millum londini, nú so nógvar fyrireikingar skulu gerast til oljuleiting í summar.

– Vit hava tikið hetta til eftirtektar og seta tí hol á flúgvingina longu mánadagin 19. februar, sigur Magni Arge. Sambandið til Aberdeen liggur soleiðis fyri, at tað eisini slepst skjótt og lætt víðari til bæði London go Stavanger. Oljufeløgini BP, Amerada Hess og Statoil, sum skulu standa fyri boringunum í summar, hava tikið væl ímóti átakinum, so vit hava góaðr vónir um at fáa flúgvingina at bera seg, hóast februar vanliga er lakur mánaði í flogferðsluni, sigur Magni Arge.

Men tað verða ikki bara oljusjeikar og vinnulívsmenn, sum kunnu nýta gott av flogferðunum, tí Atlantic Airways nýtir samstundis høvi til at bjóða føroyingum stak bíligar vikuskiftisferðir til Aberdeen.

Vikuskiftisferðirnar við uppihaldi í væl umtóktu Skeene House íbúðunum kosta við ferðaavgjaldi niður í 2.000 krónur. Sertilboðini eru galdandi trý tey fyrstu vikuskiftini.

Atlantic Airways flýgur úr Føroyum til Aberdeen hóskvøld og mánakvøld kl. 17.30. Úr Aberdeen til Føroya verður flogið somu kvøld kl. 19.10.

Í summar økir Atlantic Airways flúgvingina uppá Aberdeen upp í tríggjar og fýra ferðir um vikuna.


**Restvørur fyri avheintingarprísir**




Teldur
Printarar
Software
CD-etikettprint
Back-up støðir
Forrit
Knappaborð
CD-brennarar
o.m.a.

www.farodane.fo

FARODANE
Brekkutún 4 - FO-110 Tórshavn - Tlf. 311414 - Fax 317534

Farodane 02-01



**Norðfashion og Bamsan**



Vit hava lagt deildirnar saman og eru flutt yvir í Norðfasion, Niesl Finsensgøta 20.
Øll eru vælkomin at hyggja inná gólvið.

*Vit hava klæði til alla familjuna*

**Norðfashion og Bamsan**
N. Finsensgøta 20 · 100 Tórshavn
Tlf. 32 25 50

Sosialurin - 311820



**Kom og ger kvettið**

**Nú øll útsøluvøra fyri botnprís t.d.**

• klædningar
fyrr upp til 3.400 kr. **Nú 498 kr.**

• klædningsjakkar
fyrr upp til 1.790 kr. **Nú 298 kr.**

• jakkar 298 kr. og 198 kr.

• Buksur og troyggjur 98 kr. og 48 kr.



P/F hjá **KISSA**
Tórsgøta • 100 Tórshavn • Tel. 31 13 95

Sosialurin - 311820



**Nýtt í Føroyum**

Í sambandi við framsýningina av nýggja bilverkstaði okkara, sýna vit fram tvey flunkandi nýggj modell frá Ford

**Vit presentera spildurnýggja Ford Transit Turbodiesel fyri føroyingum, smidligasta og mest fjølbroytta vøruvognsloysnin í heiminum.**




Listin av møguleikum er so langur at tað næstan ikki er til at fata. Ert tú handverkari, hevur tú heilsølu, transport-firma, ella skal tú brúka bilin til persónstransport? Tað eru 54 ymisk basismodell í Ford Transit Turbodiesel at velja í millum, sum kunnu tillagast einhvørjum tørvi. Forhjólstrektir ella bakhjólstrektir, kassa ella last, ella tær nýtist kanska køling? Lat okkum geva tær eitt persónligt tilboð uppá tín egna Transit, sum nøktar tín serliga tørv.
Oljufýring er standardútgerð.

**Tann nýggi Mondeo Turbodiesel er nú í Føroyum - hetta er bilurin øll tosa um, hann er ljósár frammanfyri, kann ikki lýsast við orðum, men má síggjast og roynast. Nú eisini heilgalvaniseraður.**




**Hetta ferð fram hjá P/f Wenzel leygardagin 10.02. -2001 frá kl. 10-16 á nýggja bilverkstaði okkara**

**P/f Wenzel**
Við Velbastaðvegin · Tlf. 354500 · Boks 3043 · 110 Tórshavn · www.wenzel.fo

Sosialurin - 311820